# HARALDSSUND

Fólkatal: 68 (2017). Kunoyar kommuna. / *Population: 68 (2017). Municipality of Kunoy.*










Her ert tú
*You are here*

Gongutúrur
*Hike*

Hjartastartari
*Defibrillator*

Gongugøta
*Walking path*

Neyð og hjálp
*Emergency call*
**112**

Visit Norðoy

Tel. + 298 456939

Skanna hesa kotu, og kunna teg nærri um ferðamøguleikar í Norðoyggjum.

*Scan this code, and get more information about travelling in the Northern Islands.*

**Ver ein hjálpirót**

- Lat einki órudd liggja eftir tær – rudda heldur upp.
- Stuðla bygdunum – keyp staðbundnar vørur.

**Be a helping root**

*Hjálpirót is the Faroese word for rose root (Rhodiola rosea), a flourishing plant traditionally used for medicine. Hjálpirót means „helping root", and you can be one by following these simple steps.*

- *Please do not litter – but feel free to pick up litter on your way.*
- *Support the local community – buy local goods.*

*

**Tá ið tú fert til fjals**

- Best er at hava staðkendan ferðaleiðara við á túrum í fjøllunum – nærri kunning fæst á Norðoya Kunningarstovu.
- Boða onkrum frá, um tú fert til fjals uttan ferðaleiðara.
- Fylg rásum og varðum, og minst til at lata hagaportrini aftur eftir tær.
- Gev seyði, fugli og gróðuri frið.

**Hiking advice**

- *We recommend that you bring a local guide with you on mountain hikes in the Northern Islands. Please contact Visit Norðoy for further information about guided hiking trips.*
- *If you do go on your own, please let your host know where you are going.*
- *Follow the paths and cairns, and close the outfield gates behind you.*
- *Avoid disturbing sheep, birds and plants.*

Nærri kunning um trygd á fjalltúrum fæst við at skanna hesa kotu.

*For more information about safe hiking in the Faroe Islands, please scan this code.*

## FO

Haraldssund liggur eystarumegin á Kunoynni. Tað er vindhart og sólskinsdagarnir eru stuttir í hesi hugnaligu bygd, har kvøðarar úr øllum Føroyum trína í dans á Kyndilsmessu.

**Søga**

Fyrstu skrivligu keldurnar um Haraldssund eru í Hundabrævinum (1350-1400), men óvist er, hvussu gomul bygdin er. Haraldssund er kyrrupláss, og fyrr í tíðini høvdu allar bygdir á Kunoynni hvør sítt neyst á Fiskimøl (1). Eitt partaneyst (2) er í Haraldssundi, og her vóru fleiri húski í bygdini felags um at hava bát, at saga rekavið og at fáast við timbur. Skúlin (3) varð bygdur í 1930, og har ganga enn næmingar í 1.-7. flokki. Í 1949 fekk Haraldssund el-verk (4), ið varð drivið av motori, sum upprunaliga varð keyptur til bát hjá J.F. Kjølbro vinnulívsmanni. Fornminnafelagið Bríkin varðar av gamla el-verkinum, har upprunaligi motorurin er varðveittur. Byrgingin (5) varð bygd í 1986, og bergholið til Kunoyar læt upp í 1987.

**Býlingar**

Í Haraldssundi eru tríggir býlingar. Upprunaliga bygdin er heima í Húsi (6), og býlingurin stavar frá 1500-talinum. Niðan fyri býlingin er ein vøkur viadukt frá 1800-talinum (7), sum dugnaligi handverkarin Magnus Sivar lagaði. Býlingin suðuri í Bakka bygdu fólk av Skarði, tá ið tey fluttu higar eftir syndarligu bátsvanlukkuna tollaksmessudag í 1913. Timbrið frá húsunum av Skarði varð flutt við báti til Haraldssunds, og søguligu viðabularnir halda enn Kongsstovuni (8) og húsunum hjá Árnfjarðar-Jógvani (9) uppi. Suðuri á Leiti (10) er nýggjasti býlingurin, og tey fyrstu húsini her vórðu bygd í 1982.

**Rasmus í Haraldssundi**

Fyrst í 1600-talinum festi Rasmus Magnusson í Haraldssundi. Hann var sonur Magnus Heinasonar og pápi Guttorm í Múla. Í síni samtíð var hann ógvuliga navnframur, og sagnir um hann hava livað á mannamunni í øldir. Kendasta søgnin er Rasmus í Haraldssundi og huldumenninir, sum stendur í „Færøske folkesagn og æventyr" eftir Jakob Jakobsen.

**Kyndilsmessudansur**

Haraldssund, Kunoy og Skarð hava frá fyrndini verið ein sókn og eru í dag ein kommuna. Siður var, at fólk úr allari oynni komu til Haraldssunds at kvøða á Kyndilsmessu. Kvæðafólk úr øllum Føroyum leita sær enn til bygdina á Kyndilsmessu. Dansað verður í bygdarhúsinum (11), sum eisini er karmur um veitslur, brúdleyp, ervi og nýggjársveitslu. Bygdafelagið Ljósið varðar av húsinum, ið kann leigast umvegis Norðoya kunningarstovu.

## EN

*Haraldssund lies on the east side of Kunoy. It is a windswept place, and the sunny days are short in this charming town, where ballad singers from all over the Faroe Islands dance every year at Candlemas.*

**History**

*The first written sources that mention Haraldssund come from „Hundabrævið", which dates back to around 1350, but no one knows exactly how old the village is. Haraldssund is a haven free from surf, and all the villages on Kunoy used to have their own boat house at Fiskimøl (1). There is a shared boat house (2) in Haraldssund, where several houses in the village collectively kept boats, sawed driftwood and worked on timber. The school (3) was built in 1930, and pupils from 1st to 7th form still attend school here. In 1949, Haraldssund got a power station (4) which was driven by an engine originally bought for the boat of businessman J.F. Kjølbro. The natural history association Bríkin manages the old power station where the original engine is preserved. The dam (5) was built in 1986, and the tunnel to Kunoy opened in 1987.*

**Districts**

*Haraldssund has three districts. The original village was in Heima í húsi (6), and this district originates from the 1500s. Below the district you will find a beautiful viaduct (7) from the 1800s which was constructed by clever craftsman Magnus Sivar. Suðuri í Bakka was built by people from Skarð whose means of livelihood disappeared on the day before Christmas in 1913, when all the men from the village were lost at sea. Timber from the houses in Skarð was transported by boat to Haraldssund, and these historic tree trunks still support the Kongsstova (8) and the house of Árnfjarða-Jógvan (9). Suðuri á Leiti (10) is the newest district, and the first houses were built in 1982.*

**Rasmus from Haraldssund**

*At the beginning of the 1600s, Rasmus Magnusson leased a farm in Haraldssund. He was the son of Magnus Heinason and the father of Guttorm í Múla. He distinguished himself in his time because stories about him have lived on for centuries. The most famous legend is „Rasmus í Haraldssundi og huldumennirnir" which can be found in the collection of Faroese legends and folktales, „Færøske folkesagn og eventyr", published by Jakob Jakobsen in 1898.*

**Candlemas Dance**

*Haraldssund, Kunoy and Skarð used to be a parish, and they are now a municipality. Traditionally, people from the entire island gathered in Haraldssund to partake in the Faroese chain dance on Candlemas. Ballad chanters from all over the Faroe Islands still go to the village on Candlemas. The dance is held in the village hall (11), where it is common to hold weddings, parties, funeral wakes and New Year's Eve celebrations. The village association Ljósið manages the house which can be rented via Visit Norðoy.*

## VIT VIÐMÆLA

**Gongutúrur eftir gøtuni oman fyri bygdina**

Leiðin (12) gongur fram við grundini av minuhúsinum (13), har fólk flýddu undir øðrum heimsbardaga, tá ið vandi var fyri, at minur róku á land.

**Rannsóknarferð í Fiskimøl**

Fiskimøl (1) er ein sugga, har viður og annað, sum fyrr var virðismikið, rekur á land. Farið ein túr – kanska finna tit okkurt spennandi, sum er rikið á land.

**Gongutúrur eftir bygdagøtuni til Skarðs**

Fylg søguligu gøtuni til avtoftaðu bygdina Skarð (14). Nærri kunning um túrin fæst við at skanna hesa kotu:

## LOCAL'S CHOICE

**Hike along the path above the village**

*The route (12) passes the foundations of the mine house (13). During the Second World War, this was the place that people fled to whenever there was a risk of mines drifting onto the shore.*

**Explore Fiskimøl**

*Fiskimøl (1) is a place on the beach where driftwood and other things that were valuable in the old days wash ashore. Go and have a look - maybe you will find some interesting artefact that has drifted onto the beach.*

**Hike along the village path to Skarð**

*For trail (14) and further information, please scan this code:*